# Sersáttmáli millum

**P/f Thor Fisheries**

Og

**Føroya Fiskimannafelag**

Viðvíkjandi m/s Hoyvík, TN 90

Millum omanfyri nevndu partar er í dag gjørd henda semja:

Manningin á Hoyvík skal avroknast soleiðis:

1. Tá skipið fiskar ídnaðarfisk í Norðsjónum, skal skipið ganga eftir sáttmálaásetingunum fyri ídnaðarskip – í løtuni við einum býtisprosenti á 27,0.
2. Tá skipið fiskar makrel, sild og svartkjaft, skal skipið ganga eftir sáttmálaásetingunum fyri nótaskip – í løtuni við einum býtisprosenti á 17,5.
3. Semja er um, at reiðaríið rindar FF avgreiðslugjald fyri sáttmálan, svarandi til limagjaldið hjá FF fyri hvønn mannin.
   Partarnir eru samdir um, at avgreiðslugjaldið ferð av óbýttum.
4. Viðvíkjandi felagsfisking ella "joint fishing" (partroling ella fiskiskip/móttøkuskip) skal býtast soleiðis, at Hoyvík í mesta lagi fær 70 prosent av avreiðingarvirðinum.
5. Felagsreglurnar í høvuðssáttmálanum millum manningarfeløgini og Føroya Reiðarafelag eru galdandi.
6. Partarnir eru samdir um. ***Um annar av pørtunum brýtir ásetingarnar í hesum sáttmála, so kann hin parturin slíta sáttmálan, um ikki brotið er rættað innan 3 dagar eftir at tann sum hevur brotið sáttmálan hevur fingið fráboðan um hetta.***

Manning, sum er mynstrað eftir sáttmála við Føroya Fiskimannafelag, skal umframt sáttmálaásetta býtið hava 4000 krónir um dagin til javnbýtis. Hetta skal skiljast soleiðis, at um til dømis 6 limir hjá FF eru mynstraðir, skulu teir hava 4000/6 kr = 666,67 í part pr dag. Eru 4 limir hjá FF mynstarðir, fáa teir 4000/4= 1000 pr dag.

Um FF ger avtalu við onnur reiðarí um somu viðurskifti, men ásetta dagprningarupphæddiner lægri enn 4000 kr um dagin, verður upphæddin í hesum sáttmála tillagað samsvarandi.

Hesin sersáttmáli er galdandi til ársenda 2017.

Hesin sersáttmáli er skrivaður í tveimum eintøkum – eitt til hvønn partin.

Tórshavn 21. mai 2017

**Føroya Fiskimannafelag**

**P/F Thor Fisheries**